B36 bragdliga byrjan

***3. deild:** Higartil hevur gongdin verið rættuliga jøvn burtursæð frá, at B36 er fremst og at skálamenn hava verið sørir. Hini átta liðini hava trý stig hvør*

B36 vann kappingina í 4. deild í fjør, og fyribils hava teir lagt seg einsamallar á odda í 3. deild

Skulu vit døma út frá teimum báðum fyrstu umførunum, so sær tað út til, at B36 rættuliga ætlar at gera bart.

Tey feløgini, sum hava lið í 1. og í 2. deild, hava vanliga havt ilt við at fáa spælarar at taka triðja liðið í álvara. Hetta hava tað verið fleiri dømi um. Í fjør endaði tað við, at HB flutti niður. KÍ var illa statt, men teir bjargaðu skinninum. Í ár hava klaksvíkingar vunnið stórt á heimavølli eina ferð, og so hava teir við manning, sum var illa fyri, tapt heilt stórt á Argjum.

Men hjá B36 hevur tað gingið undan. Teir skifta eitt sindur av fólki frá ferð til ferð, men higartil hava teir megnað at verið stúttir, m.a. tí teir hava fleiri royndar spælarar á liðnum og eisini ungar menn, sum orka hampuliga væl at renna.

Kanska var tað eitt sindur óvæntað, men sigurin var sannførandi, tá teir triðju bestu í B36 vunnu á teimum næstbestu hjá B68. Í fyrsta umfarinum hevði B36 vunnið heili 8–0 móti teimum næstbestu hjá ÍF, og tað var ikki minni óvæntað.

Fuglfirðingar vóru í 2. hálvleiki rættuliga sannførandi móti TB, og tvørámenn vunnu sannførandi á heimavølli móti vágbingum.

Vágbingar bastu sandoyingum 3–2. Millum málskjúttarnar hjá VB var Egil Steintórsson, sum í fjør var venjari hjá TB.

Sandoyingar vunnu 3–2 á AB, men tað var um reppið, at tað kiksaði. B71 var á odda 3–0, áðrenn AB skoraði fyrra málið. Tá støðan var 3–2, hevði AB brotsspark, sum teir misnýttu.

Argjamenn vóru teir fyrstu í ár, sum á heimavølli vunnu stórsigur á KÍ. Fleiri, sum spæla á Argjum, hava áður roynt seg í bestu deildini. T.d. Signar Johannesen, sum í fjør spældi á besta liðnum hjá B68, og Petur Ritter, sum í fjør var á liðnum hjá B71.

Vágamenn taptu í fyrsta umfarinum 4–1 á Svangaskarði. Í øðrum umfari vunnu teir 4–1 á skálamonnum. Skáli flutti í fyrraárið niður úr 2. deild. Og skulu vit meta út frá avrikunum tvær tær fyrstu ferðirnar í ár, so hava teir ikki enn fingið tak á tí.

Í Klaksvík kendu skálamenn sviðan av, at Aksel Johannesen, sum lesur á flatlondum, var heima í páskafrí. Hann skoraði fýra mál, áðrenn Fríðin Ziskason, sum venur í 1. deildarhópinum, setti síðsta seymin í.

JH

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	B36	2	2	-	0	-	0	12	1	11	6
2	AB	2	1	-	0	-	1	15	4	11	3
3	TB	2	1	-	0	-	1	9	9	0	3
4	B68	2	1	-	0	-	1	5	5	0	3
5	B71	2	1	-	0	-	1	5	5	0	3
6	FS Vágar	2	1	-	0	-	1	5	5	0	3
7	ÍF	2	1	-	0	-	1	6	9	-3	3
8	VB	2	1	-	0	-	1	6	10	-4	3
9	KÍ	2	1	-	0	-	1	6	13	-7	3
10	Skála	2	0	-	0	-	2	1	9	-8	0

2. umfar

Sunnudagin 30. apríl

FS Vágar–Skáli 4–1 (0–0)
1–0: Petur Niclasen 55.
1–1: Bogi Gregersen 60.
2–1: Magnus Simonsen 79.
3–1: Magnus Simonsen 86.
4–1: Petur Niclasen 89.

B68–B36 1–4 (0–0)
0–1: Jan Hansen 53.
0–2: Hans E. Andreasen 56.
0–3: Regin Arge 80.
0–4: Vinjard Guttesen 86.
1–4: Hans Erik Danielsen 88.

ÍF–TB 6–1 (0–0)
1–0: Jákup Baldvinsson 48.
2–0: Rúni Jacobsen 54.
2–1: Niels G. Petersen 59.
3–1: Bárður Mortensen 80.
4–1: Jákup Baldvinsson 82.
5–1: Jákup H. Egholm 89.
6–1: Jákup Baldvinsson 90.

VB–B71 3–2 (2–0)
1–0: Egil Steintórsson 14.
2–0: Kári í Lágabø 19.
2–1: Eirikur Poulsen 55.
3–1: Kári í Lágabø 64.
3–2: Kristian Nielsen 72.

AB–KÍ 13–1 (3–0)
1–0: Bárður Johannesen 7.
2–0: Signar Johannesen 14.
3–0: Petur Ritter 34.
4–0: Svend Poulsen 52.
5–0: Signar Johannesen 63.
6–0: Jóannes Bæk 66.
7–0: Eyðun Dalsgarð 73.
8–0: Signar Johannesen 75.
8–1: Atli Jacobsen 80.
9–1: Heri Petersen 83.
10–1: Fróði Stenberg 85.
11–1: Oddbjørn Joensen 87.
12–1: Bárður Johannesen 89.
13–1: Signar Johannesen 89.

3. umfar

sunnudagin 7. mai

B36–FS Vágar
TB–B68
B71–ÍF
KÍ–VB
Skáli–AB

1. umfar

2. páskadag – 24. apríl

B68–FS Vágar 4–1 (3–1)
1–0: Bogi Petersen 10.
2–0: Hansmar Poulsen 13.
2–1: Hans P. Joensen br 27.
3–1: Jóannes Jakobsen 45.
4–1: Kristian Poulsen 77.

B36–ÍF 8–0 (4–0)
1–0: Regin Arge 10.
2–0: Vinjard Guttesen 26.
3–0: Tummas E. Hansen 35.
4–0: Tummas E. Hansen 45.
5–0: Vinjard Guttesen 49.
6–0: Dánial P. Johansen 65.
7–0: Dánial P. Johansen 70.
8–0: Dánial P. Johansen 80.

TB–VB 8–3 (3–1)
1–0: Jónfinn Mortensen 5.
2–0: Just Johannesen 10.
3–0: Kim Roest 20.
3–1: Hans A. Niclasen 35.
4–1: Magni Petersen 46.
5–1: Just Johannesen 55.
6–1: Niels G. Petersen 56.
6–2: Hans A. Niclasen 58.
7–2: Kaj Roest 65.
8–2: Just Johannesen 70.
8–3: Jón Gærdbo 72.

B71–AB 3–2 (2–0)
1–0: Kristoffur Vidtfeldt 30.
2–0: Páll á Reynatúgvu 39.
3–0: Kristoffur Vidtfeldt 65.
3–1: Svend Poulsen 70.
3–2: Signar Johannesen 75.

KÍ–Skáli 5–0 (0–0)
1–0: Aksel Johannesen 48.
2–0: Aksel Johannesen 56.
3–0: Aksel Johannesen 77.
4–0: Aksel Johannesen 80.
5–0: Fríðin Ziskason 84.

Signar Johannesen	AB	5
Aksel Johannesen	KÍ	4
Vinjard Guttesen	B36	3
Dánial P. Johansen	B36	3
Jákup Baldvinsson	ÍF	3
Just Johannesen	TB	3
Bárður Johannesen	AB	2
Svend Poulsen	AB	2
Regin Arge	B36	2
Tummas Eli Hansen	B36	2
Kristoffur Vidtfeldt	B71	2
Petur Niclasen	FS Vágar	2
Magnus Simonsen	FS Vágar	2
Niels Gunnar Petersen	TB	2
Kári í Lágabø	VB	2
Hans A. Niclasen	VB	2
Jóannes Bæk	AB	1
Eyðun Dalsgarð	AB	1
Oddbjørn Joensen	AB	1
Heri Petersen	AB	1
Petur Ritter	AB	1
Fróði Stenberg	AB	1
Hans Edvard Andreasen	AB	1
Jan Hansen	AB	1
Hans Erik Danielsen	B68	1
Jóannes Jakobsen	B68	1
Bogi Petersen	B68	1
Hansmar Poulsen	B68	1
Kristian Poulsen	B68	1
Kristian Nielsen	B71	1
Eirikur Poulsen	B71	1
Páll á Reynatúgvu	B71	1
Hans P. Joensen	FS Vágar	1
Jákup Helgi Egholm	ÍF	1
Rúni Jacobsen	ÍF	1
Bárður Mortensen	ÍF	1
Bogi Gregersen	ÍF	1
Atli Jacobsen	KÍ	1
Fríðin Ziskason	KÍ	1
Jónfinn Mortensen	TB	1
Magni Petersen	TB	1
Kaj Roest	TB	1
Kim Roest	TB	1
Jón Gærdbo	VB	1
Egil Steintórsson	VB	1

Sogndal tapti

Norskur fótbóltur: Føroyska liðið í næstbestu norsku deildini hevur ikki havt serliga sannførandi byrjan

Mikukvøldið vóru Julian Johnsson, Kurt Mørkøre og liðfelagarnir í Sogndal í Oslo. Teir vitjaðu á Ullevaal, har tjóðarleikvøllurin hjá norðmonnum er. Ørindini hjá Sogndal í norska høvuðsstaðnum vóru í 2. umfari í landskappingini at spæla móti Lyn.

Tað gekk illa hjá Sogndal. 547 áskoðarar sóu Lyn vinna 2–0. Málini vórðu skorað í 50. og í 82. minutti. Julian Johnsson var á miðvøllinum hjá Sogndal allar 90 minuttirnar, og hann fær gott ummæli í norskum fjølmiðlum. Setningurin hjá Kurt Mørkøre í álopinum er at skora mál. Tað eydnaðist ikki hesa ferð, og tá 26 minuttir vóru eftir, varð Kurt skiftur út.

Lyn verður mett sum eitt av uppløgdu liðunum at stríðast um uppflyting-arplássini. Hesa ferð vunnu teir, tí teir í 2. hálvleiki settu ferðina upp og brúktu meiri fyrstu ferð sendingar, enn teir høvdu gjørt í 1. hálvleiki.

Eftir at tvey umfør eru spæld hevur Lyn saman við trimum øðrum liðum fult stigatal. Trý lið hava einki stig fingið enn. Sogndal hevur fingið eitt stig.

Sunnudagin skal Sogndal spæla á heimavølli móti Skeid. Hetta liðið vann í fyrsta umfarinum 2–1 á útivølli móti Byåsen. Mikukvøldið taptu teir 4–0 á heimavølli móti Sandefjord.

JH

FM í judo fyri einstaklingar

Herfyri varð føroyameistarakapping fyri einstaklingar í judo fyriskipað í Havn. Niðanfyri hava vit prentað nøvnini á vinnarunum í einstøku bólkunum

Dreinbgir, nýbyrjaðir

-32 kg
1. Regin Mørkøre, SJF
2. Jans Andreas Hendiksen, SJF
3. Ásgrímur H. Lützen

-38 kg
1. John Sofur Mortensen, SJF
2. Janus Jacobsen, HJF
3. Rói Dam, HJF

-42 kg
1. Leo Joensen, SJF
2. Kári Damsbo, HJF

+54 kg
1. Sigmund Dahl, SJF
2. Tummas Johannesen, SJF
3. Ronni á Krákusteini, HJF

Unglingar:

Opin bólkur:
1. Petur Sigurð Johannesen, SJF
2. Jákup Andreas Thomsen, HJF
3. Christoffur Olsen, HJF

Harafturat varð latið eitt »fightarasteyp«, sumverður latið tí leikara, sum undir kappingini sýnir besta teknikk og størsta kampvilja. Hetta ferðaseteypið varð í ár latið til Christoffur Olsen úr Havnar Judofelag.



Dreingir

-38 kg
1. Bjørn Andreasen, SJF
2. Óli Hammer, HJF
3. Steen Rói Lorentsen, HJF
3. Eirikur Jákupsson, HJF

-42 kg
1. Teitur Joensen, SJF
2. Áki Davidsen, HJF
3. Torvald Abrahamsen, HJF

-48 kg
1. Jógvan Páll Kristiansen, SJF
2. David Nilssen, HJF
3. Bjartur F. Clementsen, HJF

-54 kg
1. Jákup Sumberg, SJF
2. Karstin Vang, HJF
3. Sverri Strøm

+54 kg
1. Jákup Andreas Thomsen, HJF
2. Hjalmar Johannesen, SJF
3. Jákup Páll Kristianssen, SJF
3. Tórur Strøm

Christoffur Olsen úr Havnar Judofelag vann fightarasteypið, sum á hvørjum ári verður latið einum íðkara

John til Leiftur?

Íslendska Morgunblaðið skrivar í dag, at íslendska felagið, Leiftur, í løtuni er í samráðingum við John Petersen og B36

JÁKUP MØRK

Lítt er til at felagið hjá Jens Martini Knudsen, Leiftur, hevur saknað ein føroyskan málskjútta, síðani Uni Arge í fjør gjørdi av at flyta til Akranesar at royna fótbóltseydnuna.

Vilja hava John

Í øllum førum skrivar Morgunblaðið í dag, at Leiftur í løtuni eru í samráðingum við B36 og John Petersen, um at fáa føroyska landsliðsleikaran til Íslands.

Blaðið skrivar millum annað, um John Petersen, at hann hevur verið ein hin vandamesti álopsleikarin í føroysku kappingini seinnu árini, har hann hevur spælt við GÍ og B36 (hann hevur eisini spælt 1. deildarfótbólt við B68 blðm.), umframt at hann hevur leikt 25 dystir á føroyska landsliðinum.

Eisini hava teir bitið merki í, at John í 1994 var toppskjútti í føroysku kappingini, tá hann leikti við GÍ, umframt at hann í 50 landskappingardystum við B36 hevur skotið ikki minni enn 49 mál.

Leiftur vil nú hava fatur á John Petersen, men sjálvur sigur føroyski landsliðsspælarin, at eingin avgerð er tikin í málinum

Esini veit blaðið at siga, at ein liður í hesum samráðingum hevur verið, at B36 um páskirnar slapp at læna Jens Martin Knudsen.

Samband men eingin avgerð

Sjálvur váttar John Petersen, at tað hevur verið samband millum partarnar.

- Vit tosaðu saman, nakað áðrenn landsliðið fór til Liktinstein, men enn er eingin avgerð tikin í hesum sambandi.

Kristian á Neystabø, formaður í B36, sigur seg onga viðmerking hava til tíðindini frá íslendska blaðnum.

Rein sponsk finala

Eftir fyrru hálvfinalunum at døma, verður finalan í UEFA Champions League ein innanhýsis sponsk uppgerð

JÁKUP MØRK

Heldur óvæntað er nú líkt til, at teir báðir finalistarnir í europeisku meistarakappingin verða Real Madrid og Valencia, sum bæði vunnu sannførandi í fyrru hálvfinalunum, sum vórðu leiktar týs- og mikukvøldið.

Barcelona hevur ein trupulleika

Týskvøldið hittust Valencia og Barcelona.

Flestu fótbóltsserfrøðingar vildu helst vera við, at Barcelona mundi vera favorittur at koma víðari úr hesi hálvfinaluni, men tá avtornaði høvdu catalanararnir fingið ein orduligan avsmurning.

4-1 varð úrslitið, og tá samanum kemur, var hetta kanska slettis ikki so óvæntað.

Seinnu árini hevur Valencia nevnliga havt til fragd at vinna greiðar sigrar á Barcelona, og serliga hevur tað verið Gustavo Lopez, sum hevur gjørt um seg í hesum dystum.

Hesu ferð skeyt Lopez bert eitt mál, men haraftURímóti var talan um eitt sera týdningarmikið mál, tá hann stutt fyri leiklok økti upp í 4-1.

Seinasta málið viðførdi í øllum førum, at tað nú verður nógv torførari hjá Barcelona at vinna samanlagt á Valencia, tá liðini aftur hittast á Camp Nou.

Í fjórðingsfinaluni vísti Barcelona annars rættan klassa, tá tað eydnaðist teimum at venda 3-1 tapinum móti Chelsea, men av mongum verður tapið móti Valencia mett sum ógjørligt at venda.

Annars skeyt Angulo tvey mál fyri Valencia, meðan Mendieta setti eitt brotsspark í netið. Málið hjá Barcelona var sjálvmál.

Real enn einaferð

Real Madrid hevur metið, tá tosað verður um sterkastu europeisku kappingina.

Sjey ferðir hevur kongaliga spanska felagið verið best í Europa, seinastu ferð fyri tveimum árum síðani.

Hóast søgan sostatt peikaði á Real Madrid, so var einki at taka seg aftur í, at Bayern München vóru favorittar at vinna samanlagt á Real Madrid. Hetta var serilga grundað á úrslitini í bólkaspælinum, har úrslitið samanlagt varð 8-3 til týska felagið.

Hetta kann framvegis eydnast, men uppgávan gjørdist í øllum førum munandi truplari, eftir at mikukvøldið eydnaðist Real at vinna fyrru hálvfinaluna 2-0.

Franska problembarnið, Nicolas Anelka, legði fyri longu í 4. minutti, tá hann hegreiddi eina sending frá Raul í netið.

Skjóta málið hevði eisini við sær, at spaniólarnir rættuliga fingu gongd á spælið, og í roynd og veru kundi sigurin væl verið størri enn tvey mál.

Seinna málið kom, tá 34 minuttir vóru leiktir. Michel Salgado og Raul spældu seg við 1-2 spælið inn um týsku verjuna, og hart kroystur kom Jens Jeremias at beina bóltin í egið mál.

Nærmasta týska liðið kom einum máli, var tá Tarnat skeyt vandamikið frístpark úr stórari fjarstøðu, men harða skot hansara fór beint framvið spanska málinum.

Sostatt er líkt til, at talan aftur í ár verður um ein finaludyst fyri meistaralið, har hvørki av liðunum er komið við sum meistari.

Fyrstu ferð hetta kom fyri var í fjør, tá Manchester United og Bayern München leiktu finaludystin. Bæði vóru tey árið fyri endaði sum nummar tvey í heimligu kappingini.